# NØVN

SAMBAND
magnus gunnarsson
maggi@sosialurin.fo
tlf 341800 fax 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Frelsunarherurin, Heimaforbundið:

## Komið og syngi við




TÍÐINDASKRIV

Hóskvøldið 15. mars 20.00 skipar Heimaforbundið hjá Frelsunarherinum í Havn fyri sangkvøldi, har streingjakórið syngur, og Eyðfinn Joensen skipar fyri sanginum, tá øll syngja við.

Innsavnan verður til missiónarbeiði hjá Heimaforbundinum. Peningurin fer til Kongo-Kinshasa í Afrika. Stórur dentur verður lagdur á undirvísing og at hjálpa familjum har møður og børn liva av skøkjuvirksemi fyri at fáa sína inntøku.

Endamálið er at fyribyrgja barnaprostitión og leggja tilrættis inntøkuna hjá familjunum har og minka um vandan fyri HIV og AIDS

Eisini verður andakt og ein drekkamunnur. Øll eru vælkomin.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Julianna Sivertsen,** fødd Nystrøm, Klaksvík, andaðist á Klaksvíkar sjúkrahúsi sunnudagin 11. mars 85 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Kistan við **Jóhan á Lava**, ættaður úr Tórshavn, búsitandi í Klaksvík, fer úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi í kvøld kl. 18. Jarðarferðin verður úr Betesda týsdagin kl. 13.

**Jacob Herman Poulsen, Sumba**, andaðist á suðuroyar sjúkrahúsi 8. mars 44 ára gamal. Jarðarferðin verður mánadagin klokkan 13. Tey ið vilja minnast Jacob, kunnu lata eina peningagávu til børnini konta í suðuroyar sparikassa.

**Åge Udbø úr Havn** andaðist á Hjørring Sjúkrahúsi 7. mars, 73 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju týsdagin 13. mars kl. 13. Sungið verður úr Sálmabókini.

**Dagurin**

**13. mars. Macedonus**, deyður umleið ár 300. Tikin av døgum saman við konuni Patriciu og dóttrini Modestu.

Meginfelag Føroyskra Studenta:

## MFS nýtt ráð

TÍÐINDASKRIV

3. mars var árligi aðalfundurin hjá MFS (Meginfelag Føroyskra Studenta) hildin í Århus.

Rákið seinastu árini hevur verið, at talið av føroyingum, sum velja at gera síni lestrarørindir uttanfyri Danmark er vaksandi.

Tískil hevur eitt av málunum hjá gamla ráðnum í MFS verið, at ráðið kemur at fevna breiðari landafrøðiligt, enn tað higartil hevur gjørt, og ikki minst at fáa lesandi í Føroyum at skipa seg undir MFS. Tí er tað at frøðast um, at nýggja ráðið í MFS er mannað við lesandi úr fýra ymiskum býum.

Vónin er, at hetta verður við til at MFS fer at røkka ein breiðari skara av lesandi, og eisini fer at geva føroysku myndugleikunum eina meira fleirlitta mynd av teimum lesandi og umstøðum teirra.

Vald inn í nýggja ráðið hjá MFS eru: Fía Lindenskov, forkvinna (Keypmannahavn), Jákup Emil Hansen, næstformaður (Århus), Súsanna Husgaard Niclasen, kassameistari (Keypmannahavn), Malan Ludvig, skrivari (Keypmannahavn), Cecilia Gjerding Rasmussen (Århus), Durita L. Jóansdóttir (Keypmannahavn), Erla Petersen (Århus), Janus á Ryggi (Tórshavn), Katrin Sørensen (Keypmannahavn), Rúna Jacobsen (Tórshavn), Torkil Ejdesgaard (Aberdeen). Tiltakslimir eru: Bergitta Dalsgaard Thomsen (Keypmannahavn), Hjørdis Klein (Keypmannahavn). Tiltakslimirnir vanta á myndini.

